# Robin skal renna av Viðareiði til Sumbiar

**RENNARI Fyri nøkrum árum síðani, var hann so sjúkur av liðagikt, at hann fekk nóg illa gingið ein túr í býnum. Nú fer Robin Clementsen at renna av Viðareiði til Sumbiar. Hann ætlar at brúka tríggjar dagar um teir 240 kilometrarnar**

Eyðun Klakstein

Fyri seks árum síðani vóru beinini hjá Robin Clementsen so vánalig, at hann fekk nóg illa spáka sær ein túr. Men nú er hann so væl fyri, at hann ætlar sær at renna av Viðareiði til Sumbiar.

– Eg fekk staðfest liðagikt fyri seks árum síðani, og eg hevði stórar trupulleikar av tí, sigur Robin Clementsen.

– Tað versnaði skjótt við liðagiktini, til eg møtti einum kinverskum lækna á Landssjúkrahúsinum. Hann gav mær tey ráð at eta rátt ingifer, tí tað skuldi hjálpa fyri giktina

Robin Clementsen sigur, at ingifer smakkar ikki væl, men tað loysti seg at eta tað.

– Aftan á trý ár var eg blivin so frægur, at eg kundi ganga longri túrar. Og í juni mánaði í fjør setti eg mær fyri at renna og ganga ein longri túr, sum eg kláraði at gjøgnumføra, sigur hann.

Leiðin fekk frá Saksun til Vestmanna og so til Havnar umvegis Kvívík, Stykki, Skaling, Norðradal, Syðradal og Velbastað.

– Hesin túrin tók mær 14 tímar og gav mær rættiliga blóð á tonna at royna nakað enn størri, sigur Robin Clementsen.

### Tokka til Suðuroynna

12. mai fer Robin Clementsen undir eina enn longri ferð. Hann fer at renna og ganga av Viðareiði í norði og til Sumbiar í suðri.

– Fleiri hava spurt meg, hví eg havi valt júst hesi støð at renna frá og til. Eg havi ein sera stóran tokka til Suðuroynna av ymiskum orsøkum, mær dámar væl fólkið har, og tí vil eg gjarna enda ferðina har, sigur hann.

Ein onnur orsøk til renningina er eisini, at hann vil prógva fyri sær sjálvum og øðrum, at hann er komin væl fyri seg eftir at hava verið illa plágaður av liðagikt.

– Eg vóni, at eg kann klára teinin upp á tríggjar dagar, sigur Robin Clementsen.

Hann rennur av Viðareiði til Havnar. Síðani siglir hann í Sandoynna, har hann rennur oynna á tamb, og síðani siglir hann til Suðuroynna og rennur úr norði til suður á henni.

eydun@sosialurin.fo



LIÐAGIKT

*– Eg fekk staðfest liðagikt fyri seks árum síðani, og eg hevði stórar trupulleikar av tí, sigur Robin Clementsen*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Eivør Pálsdóttir við nýggjari fløgu

**FLØGUÚTGÁVA Nýggja fløgan hjá Eivør Pálsdóttir er komin. Á fløguni eru 11 løg, har hon sjálv eigur tey flestu**



Eirikur Lindenskov

Leingi er tað ið væl skal vera, men nú er hon so her, nýggja fløgan hjá Eivør. Heiti á fløguni er Larva og á fløguni er 11 løg, sum í stóran mun eru skrivað av Eivør sjálvari. Tvey av løgunum eru skrivað saman við Benjamin, eitt lag er eitt gamalt Clickhaze lag, meðan lagið Hounds of Love er lænt frá Kate Bush. Fløgan er í høvuðsheitum upptikin í Lundgaard Studio í Danmark og á Støkumørk, innan Glyvur. Tónleikararnir, ið eru við á fløguni eru Benjamin Petersen, Høgni Lisberg og Mikael Blak, meðan framleiðari hevur verið Jens L. Thomsen.

– Tónleikurin er á ein hátt bæðu myrkur og innanvendur, samstundis sum hann er beint í andlitið, og sum G greiddi frá á sínari heimasíðu, so kunnu vit ikki annað enn verða samd í, at Jens hevur megnað at hála ráu og villu Eivør fram aftur úr skápinum, meðan pena, fitta mannabarnið er pakkað niður fyri nú, skriva útgevararnir í tíðindaskrivi.

Úrslitið av samstarvinum millum Eivør, bólkin og Jens er á ein hátt bæði myrkt og innanvent, samstundis sum tað er beint-í-andlitið. Minimalistiskt, men stórt. Huglagið er stundum klassiskt, tó mystiskt og onkursvegna vandamikið ella ófrættakent. Ljóðið er vistfrøðiligt og tilvitað skitið. Høvðusljóðføri í ljóðmyndini eru tey elektronisku. Synthbassar, Moogar og Juno ljómborð renna saman við ullintum trummum og tjúkkum gittarum, meðan Eivør, saman við filmiskum streingjaspæli og kórasangi, sveimar meistarliga omanfyri.

Í summum sangum er Eivør ein særdur elskari, í øðrum ein valdandi drotning. Men í øllum er hon Eivør. Einki, at takað feil av. Hon dregur allar endarnar saman í eina heild, ið bera hennara heilt egnu framúrskarandi tónleikaligu eyðkenni.

Sum eyka krydd til tónleikin hevur Tróndur Bogason arrangerað strúkarar og kór til nøkur av løgunum. Tað er Mpiri, ið hevur sungið kórpartarnar, meðan íslendska strúkikvartettin Caput hevur innspælt streingirnar.

Fløgan kemur út í handlarnar í Føroyum og Íslandi 12. mai, og sama kvøldið verður høvið at hoyra Eivør saman við bólkinum hjá sær saman og við kórinum Mpiri til konsert í Sjónleikarahúsinum.

Útgávukonsertirnar vera 12. og 13. mai klokkan 21 í Sjónleikarahúsinum, og 14. mai klokkan 21 í Losjuni í Gøtu. Umframt tað verður høvið at hoyra Eivør við bólki og við Mpiri til konsertina, sum verður í Saltsiloini tann 15. mai.

– Eivør og bólkurin eru júst heimafturkomin av konsertferð í Danmark, so vit kunnu vænta okkum at hoyra ein væltrimmaðan og væl samanspældan bólk, sum eftir eina langa prosess í studio nú kann gleðast um at sleppa at spæla tilfarið live, siga útgevararnir.

eirikur@sosialurin.fo